# Løgmaður loyst Annlis Bjarkhamar úr starvi

**Tann fimti landsstýrismaðurin við mentamálum síðan 2000 noyddist úr starvi týsdagin. Rokið um nýggja landsantikvarin førdi til, at løgmaður handaði Annlis Bjarkhamar uppsagnarbræv**

UPPSØGN
*Ingi Rasmussen*

Fyrrapartin týsdagin segði løgmaður Annlis Bjarkhamar úr starvi sum landsstýriskvinna við mentamálum.

Hann handaði henni eitt skriv klokkan 10, har hann gjørdi greiðu fyri sínari niðurstøðu í málinum, sum hann hevur kannað eina tíð.

»Málið um setan av landsantikvari er handfarið soleiðis, at eg sum heild meti, at tú hevur sett trúvirðið á okkara umsiting í vanda. Eisini meti eg, at tín handfaring av málinum kann vera til stóran skaða fyri framtíðar setanir av almennum starvsfólki,« skrivar Anfinn Kallsberg løgmaður í brævinum til Annlis Bjarkhamar.

Løgmaður harmast samstundis um, at landsstýriskvinnan ikki legði uppfyri sínum viðmerkingum undir sjálvari setanartilgongdini og staðfesti setanina, hóast løgmaður bað um frágreiðing um málið.

Løgmaður vendi sær til Annlis Bjarkhamar 5. februar 2003 og bað hana lata sær eina nágreiniliga lýsing av málinum og kravdi øll viðkomandi skjøl útflýggjað.

Skjølini fekk hann 13. februar, og hann hevur eisini fingið viðmerkingar frá landsstýriskvinnuni og aðalstjóranum í Mentamálaráðnum.

Sum kunnugt setti Annlis Bjarkhamar danan Steffen Stumman Hansen í starvið sum landssantikvar, hóast setanarnevndin í tveimum umførum peikaði á virkandi landsantikvarin Símun V. Arge.

Grundað á gjøgnumgongd av skjølunum í málinum um landsantikvarin metir løgmaður, at »fleiri viðurskifti eru, sum benda á, at málið ikki er handfarið á nøktandi hátt«, skrivar løgmaður í brævinum til Annlis Bjarkhamar og leggur afturat, at »tað av røttum er sáddur ivi um embætisførslu tína í hesum sambandi«..

Løgmaður metir málið av stóran meginregluligan týdning, tí grundleggjandi trúvirðið á almennu fyrisitingina liggur í avgerandi mun í starvssetanum. Tað hevur stóran týdning, at mannagongdir og siðvenjur verða fylgdar, tá starvsfólk verða sett.

»Tað er siðvenja, at tað eru embætisfólk, sum fyrireika málini, tá avgerðir um almennar setanir skulu takast, eins og tað er siðvenja, at embætisfólk hava um hendi umsitingina av slíkum málum. Í hesum máli hevur tú luttikið í málsviðgerðini á ein óvanligan hátt. Tí kunnu spurnartekn setast við, um tað einans eru tikin saklig atlit, tá avgerð varð tikin um at seta landsantikvar, serstakliga tí hetta varð gjørt beint ímóti teimum tilmælum, sum setanarbólkurin gav tær«, er greiða niðurstøða løgmans.

Hann vísir til almenna setanarpolitikkin og staðfestir, at tað er ein týðandi avgerð fyri bæði starvsfólk og arbeiðspláss, tá nýggj starvsfólk verða sett. Ikki minst tá leiðarar verða settir. Tí mugu ávísar mannagongdir fylgjast. Setanarpolitikkurin skal tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.

Og tað metir løgmaður altso ikki, at umsøkjararnir kunnu vera í hesum føri.

Sostatt noyðist Annlis Bjarkhamar at handa lykilin til mentamálaráðið víðari. Hon er fimti landsstýrimaðurin við mentmálum síðan 2000. Nú skal tann sætti royna seg.

Høgni Hoydal:

# Tað mest óanstendiga eg havi upplivað

**– Hetta málið prógvar, at føroyskur politikkur framvegis er ein barnagarður, heldur Høgni Hoydal, sum er sera skuffaður av, at løgmaður ikki vildi bíða við avgerðini, til partarnir høvdu tosað saman**

UPPSØGN
*Eirikur Lindenskov*

– Hetta er tað mest óanstendiga eg havi upplivað í mínum politiska lívið. Tað undrar meg sera nógv, at løgmaður ikki er maður fyri at siga hetta mann til mann, men kemur við hesum, meðan eg eri uttanlands, segði Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, við Sjónvarp Føroya á middegi í gjár.

Høgni Hoydal er staddur í Stókholmi í Svøríki, men hann tosaði við løgmann mánakvøldið, tá løgmaður boðaði frá avgerðini, og gav Annlis Bjarkhamar høvi sjálv at siga seg úr starvi.

– Tað allar minsta var, at løgmaður vildi tosa við okkum um hetta, so vit kundu finna eina semju. Men tað var hann ikki maður fyri, segði Høgni Hoydal, sum minti á fleiri onnur viðurskifti viðvíkjandi landsstýrismonnum, tá løgmaður hevði góða tíð.

Hann nevndi t. d. tá John Petersen, landsstýrismaður og fólkafloksmaður var skuldsettur fyri neyðtøku, tá hevði løgmaður góða tíð at bíða.

Hann nevndi, tá Finnbogi Arge, landsstýrismaður og fólkafloksmaður setti og koyrdi ein ein landsverkfrøðing yvir eina nátt. Tá hevði løgmaður góða tíð og gjørdi kortini einki, fyrr enn samgongan tók seg saman at krevja av løgmanni, at hann gav landsstýrismanninum eina nøs.

Hann nevndi eisini málið um niðurstøðuna hjá kanningarstjóra um Jørgin Niclasen, landsstýrismann og fólkafloksmann, sum heldur ikki hevði skund hjá løgmanni, og sum endaði við, at Tjóðveldisflokkurin mátti taka undir við einum misálitisuppskoti.

Høgni Hoydal vil ikki siga, um ella hvørjar avleiðingar hetta fær fyri landsstýrissamgonguna. Men hann sigur, at tað sum sigast skal, verður sagt við Anfinn Kallsberg, mann til mann og ikki varpað út í fjølmiðlunum áðrenn røttu viðkomandi hava fingið boðini.





*– Er tað mín uppgáva at gera sum embætisverkið sigur? So nýtist okkum ikki politikarar. Eg skal taka eina avgerð, og tá tey ikki hava megnað at ráðført meg nøktandi, so má eg sjálv taka avgerðina eftir míni bestu sannføring, sigur Annlis Bjarkhamar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Lætnað í skilnaðarstundini

**Hon fekk bert níggju mánaðir í starvinum sum landsstýriskvinna við mentamálum. Men hóast hon fekk sekkin, so fellur hon ikki fátt, tí hon heldur seg onki skeivt hava gjørt. Hon fegnast um tey mál, sum hon hevur loyst úr lagdi. Hennara hjartabarn er, at hon hevur fingið ungum menningartarnaðum skúlatilboð eftir summarferiuna**

FARVÆL
*Ingi Rasmussen*

Har fall onki tár, tá Annlis Bjarkhamar boðaði frá, at hon hevði fingið sekkin sum landsstýriskvinna við mentamálum. Hetta er ein støðugur møguleiki, tá tú ert politikari á ovastu rók, heldur hon.

– Eg eri væl fyri. Tá tú tekur avgerðir, so noyðist tú eisini at vera til reiðar at taka avleiðingarnar. Eg havi gjørt mítt besta, og eg eri framvegis sannførd um, at eg onki galið havi gjørt, sigur Annlis Bjarkhamar.

Løgmaður boðaði henni longu seint mánakvøldið frá, at hann fór at siga henni upp dagin eftir. Umleið klokkan 10 fyrrapartin týsdagin kom uppsagnarbrævið. Og eftir at Annlis hevði lisið brævið, heldur hon seg kunnað staðfesta, at talan er um eina reina politiska uppsøgn.

– Eg eri ótrúliga lætnað um, at løgmaður ongastaðni vísir á, at eg havi framt eitt brot á nakra lóg ella reglu. Løgmaður hevur kannað málið í 14 dagar, men kann hann hvørki peika á fyrisitingarlógina, setanarpolitikk ella stýrisskipanina í sínum grundgevingum fyri uppsøgnini, sigur Annlis Bjarkhamar.

### Í egnar hendur

Spurd, um tað ikki kortini er ímóti góðari siðvenju, tá fólk skulu setast, at hon er farin beinleiðis inn í málið og hevur viðgjørt tað fyrisitingarliga, svarar hon kortini játtandi.

– Tað er óvanligt, men hetta er eisini eitt óvanligt mál. Orsøkin er, at eg fekk ikki nakað nøktandi tilmæli frá setanarnevndini. Eg bað hana grundgeva gjøllari fyri sínari innstilling, men eg fekk onki nøktandi svar. Tí noyddist eg sjálv at gera tað arbeiðið. Fyrst spurdi eg meg kortini fyri á løgmansskrivsstovuni, og haðani fekk eg at vita, at tað hevði eg loyvi til, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon ásannar, at hon stendur í andsøgn til sítt egna embætisverk, og tað er óheppið. Men hon heldur hinvegin ikki, at hon blint eigur at fylgja teimum tilmælum, sum hon fær frá sínum fakfólkum.

– Er tað mín uppgáva at gera sum embætisverkið sigur? So nýtist okkum ikki politikarar. Eg skal taka eina avgerð, og tá tey ikki hava megnað at ráðført meg nøktandi, so má eg sjálv taka avgerðina eftir míni bestu sannføring, sigur Annlis Bjarkhamar.

### Glað um fleiri mál

Hóast Annlis Bjarkhamar sostatt noyðist at lúta fyri einum lutvíst lítlum máli, so angrar hon onki. Men hon ásannar, at hon er kedd um, at hon ikki fær borið nøkur av teimum málum í land, sum hon hevur sjósett.

– Tað harmar meg, at eg ikki fái gjørt tað stóra arbeiðið, sum er sett í gongd við fólkaskúlanum. Tað er eisini við tógvi stríð, at eg havi fingið eina semju um, hvussu fólkakirkjan skal yvirtakast, og tað kundi eg sjálvandi eisini hugsað mær at gjørt liðugt. Men eg kann fegnast um, at eg havi fingið Tjóðpall Føroya lagdan fyri tingið, so hann kann setast á stovn í 2004. Og so fegnist eg serliga um, at eg havi fingið ungum menningartarnaðum eitt skúlatilboð eftir summarferiuna, tá tey fara úr Sernámsdeplinum, sigur Annlis Bjarkhamar.

### Ongin kæra

Fyri nógv hevur málið um landsantikvarin verið eitt stríð millum embætisverkið og politikaran. Nú Annlis mátti lúta, kann tað tykjast, sum embætisverkið hevur valdið.

– Spurningurin er, hvør hevur valdið, og kanska er embætisvaldið størri, sigur Annlis, sum kortini ikki hevur hug at siga meira um tað.

Hon ásannar samstundis, at tað var stak óheppið, at setanarnevndin var mannað við hennara hægstu embætisfólkum, tí tað gjørdi, at hon varð fullkomiliga avbyrgd. Men hon heldur fast um, at ongin uttanífrá hevur trýst hana at taka eina avgerð. Hana eigur hon púra einasamøll.

Annlis hevur áður boðað frá, at hon ætlar sær at kæra málið fyri umboðsmannin, um løgmaður gekk ímóti hennara avgerð, men nú hon staðfestir, at løgmaður hevur tikið eina politiska avgerð, ger hon ikki meira við tann partin.

### Próvtøkan kallar

Annlis Bjarkhamar fekk níggju mánaðir á hægstu politisku rókini, og nú hon fer frá, ætlar hon at gera seg lidna við sína lærarAútbúgving, sum hon breyt av síðsta summar. Tvær próvtøkur eru eftir, men politikkurin verður kortini ikki heilt sleptur.

– Tað er ivasamt, um eg komi í slíkan sess aftur, men eg vil gjarna halda fram í royndini at ávirka sjálvstýrispolitikkin onkursvegna. Eg má siga, at tann partin havi eg saknað, og má bara staðfesta, at sjálvstýrisgongulagið hevur verið út av lagi vinglut, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon er fimti landsstýrismaður við mentamálum síðan 2000. Nú tann sætti skal setast, er tað ikki greitt, um Tjóðveldisflokkurin fer at seta hann. Men hvør tað so verður, so krevst ein sterkur vilji.

– Hetta er eitt ógvuliga breitt øki, sum ikki hevur tann størsta áhugan millum politikarar, og tí er tað eitt trupult mál at fáa á dagsskránna. Mín eftirmaður má hava ein sterkan vilja og gott handalag, skal nakað koma á skafti, sigur Annlis Bjarkhamar.

## Løgmaður afturvísir ógegni

**Ein roynd at grugga málið. Soleiðis kallar Anfinn Kallsberg løgmaður ákærurnar um, at hann skal vera ógegnigur í málinum um landsantikvarin**

LANDSANTIKVAR
*Ingi Rasmussen*

Róð hevur verið framundir, at Anfinn Kallsberg løgmaður er ógegnigur í málinum um setan av nýggjum landsantikvari, sum hann er farin inn í.

Tað eru familjuviðurskifti løgmans, sum skulu eitast at verða ein forðing. Andrass Mortensen, sum sat í setanarnevndini, ið tvær ferðir mælti til at seta Símun V. Arge í starv, er systirsonur løgmann. Systir løgmann starvast eisini í skrivstovuni hjá Fornminnissavninum, og har hava starvsfólkini harðliga mótmælt, at Símun V. Arge varð vrakaður av landsstýriskvinnuni við mentamálum Annlis Bjarkhamar.

Tí hava ávís fólk alment skírt Anfinn Kallsberg ógegnigan at taka støðu í málinum. Men løgmaður vísir hesum ákærum aftur.

– Tað er spurningurin, hvussu tú roynir at grugga málið. Løgmaður hevur sambært stýrisskipanini eftirlit við sínum landsstýrismonnum. Og mær vitandi eri eg ikki á nakran hátt ógegnigur mótvegis nøkrum landsstýrismanni. Tað er tað, sum telur í hesum føri, sigur løgmaður.